# Klaksvíkar Kommuna bøtir um trivnaðin hjá børnunum

**Fleiri spælipláss eru í Klaksvík, men tað er ein sannroynd, at tey ikki hava verið í góðum standi longi. Men hetta er nú við at verða broytt**

TRIVNAÐUR
*Solby A. Eliasen*


*Spæliplássini í Klaksvík eru nú gjørd í stand, og verður eitt nýtt eisini gjørt undir Klakki. Hetta fyri at vegirnir ikki skula verða nýttir sum spælipláss framyvir*

Klaksvík:
Eitt, sum er gjørt við tvey av spæliplássunum í býnum, er at leggja graslíki á. Soleiðis at tað liggur betri fyri at spæla fótbólt har.

Graslíkið er frá fótbóltsvøllinum í Klaksvík, sum bleiv útskift í fjør.

Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, sigur, at kommunan tók avgerð um at goyma graslíki til spæliplássini, tí tað varð mett, at kunna gera stóran mun.

- Eftirspurningurin eftir graslíkinum hevur verið avbera stórur, og vit hava selt alt, tað sum vit ikki sjálvi skuldu nýta.

Fimm spælipláss eru í Klaksvík og hava tvey av teimum nú fingið graslíki. Tað er spæliplássið á Jørundsgøtu og tað í Mylnutúni.

Hesi bæði spælipláss verða nógv nýtt um dagarnar. Ikki bert av børnum, sum spæla har um kvøldarnar, men eisini av dagrøktarum og barnagørðum.

Í gjár vóru børnini frá dagstovninum Mylnuhúsinum á spæliplássinum í Mylnutúninum. Tá søgdu onkrar av pedagogunum, at graslíkið var so nógv betur. Tí børnunum dámdu so nógv betur at spæla har, nú tey kundu lata seg detta, uttan at vera nakað serliga bangin um, at tey fóru at fáa so ilt.

Til dagligt eru eisini altíð nógv børn niðri á fótbóltsvøllinum og spæla, men nú graslíki er komið á vøllin í spæliplássinum eisini, so kann tað vera, at tey fara at spæla líka nógv har sum á vøllinum.

### Nýtt spælipláss

Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri sigur, at kommunan fer at gera eitt nýtt spælipláss undir Klakki í Klaksvík nú.

- Har eru so ómetaliga nógv børn nú, og tað er so vandamikið, at tey noyðast at spæla á vegnum, har nógv ferðsla er hvønn dag.

So er tað nógv betur at gera teimum eitt spælipláss har úti á leiðini, og soleiðis fáa tey av vegnum. Har er onki spælipláss í nánd, so tað er hart tiltrongt.

Hetta at gera spælipláss til børnini ella at seta tey gomlu í stand, hevur nógv at siga. Tí tað ger trivnaðin hjá børnunum í býnum betur.

- Og børnini eru jú framtíðin, so tað er umráðandi at tey trívast og hava onkrastaðni at halda til og savnast. Kanska serliga tey ljósu summardagarnar og kvøldini, men eisini eitt vetrarkvøld, tá veðrið loyvir tí.

Eitt spælipláss er eisini úti í Víkunum, men har eru ikki so nógv børn longur, so tað verður ikki gjørt nakað við tað í hesum umfarinum. Haraftur at, er ikki so nógv at bjóða á tí spæliplássinum, tí sum er ber bert til at spæla bólt og annað har.

Meðan eitt nú spæliplássini í Mylnutúninum og á Jørundsgøtu hava reiggjur, sandkassa og skreiðubana.

Steinbjørn sigur, at tað er býargartnarin Hans Hjalti Skaale, sum hevur sett spælihúsið við skreiðubana og øðrum upp á spæliplássinum á Jørundsgøtu. Og tað er eisini komið rættiligt lív í tað aftur eftir, at tað kanska ikki hava verið so mong børn har. Nú spæla børn har hvønn dag og hvørt kvøld.

Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, sigur, at hann heldur tað vera sera áhugavert at síggja at tað eisini eru foreldur, sum taka seg saman og gera eitt hvørt fyri børnini.

Sum dømi nevnir hann foreldur úr Rituvík, sum komu til Klaksvíkar at keypa ein part av graslíkinum, tí tey høvdu ætlanir um at gera eitt spælipláss í bygdini.

- Í dag hava tey eitt sera snotuligt spælipláss til børnini í Rituvík, sigur Steinbjørn.

Tað er sera umráðandi at hava spæliplássini fyri at halda børnunum vekk av vegunum, sum tíverri alt ov ofta verða nýttir til spælipláss sum er. Men Steinbjørn heldur, at tað ber væl til, um spæliplássini verða gjørd í stand og hava nakað at bjóða børnunum.

- Tí um spæliplássið er snotuligt, so trívast børnini har, sigur borgarstjórin í Klaksvík at enda.

# Stjørnan ikki við komandi kappingaár

**Støðan er beinleiðis hættislig í kvinnuliga 1. deildar hópinum hjá Stjørnuni.**
**- Av teimum sekstan sum vóru við til at vinna føroyameistaraheitið fyri trimum árum síðani, eru bert tríggjar eftir**

HONDBÓLTUR
*Solby A. Eliasen*

Klaksvík:
Orðini eigur Geir Wardum, formaður í Stjørnuni..

- Tað er ræðuligt at missa so nógvar leikarar upp á trý ár. Tað verður sera torført at byggja uppaftur, so vit hava ikki góðar vónir um at síggja fyrsta kvinnulið hjá Stjørnuni í kappingini komandi kappingarár, sum er, sigur hann.

Og hvar eru so leikararnir farnar? Geir greiðir frá, at fleiri eru farnar uttanlanda í lestrarørindum, meðan aðrar eru fluttar til Havnar. Tað vóru onkrir útlendskir leikarar á liðinum í fjør, men av teimum er bert gjørd avtala við málmannin. Simona Dziugyte er farin til Neistan at spæla.

- Men hana hava vit ikki gjørt nakra avtalu við heldur, sigur Geir Wardum.

Adrijana Milodanovic er farin heim aftur til Jugoslavia. Stjørnan gjørdi ikki nakra avtalu við hana um komandi kappingarár.

- Adrijana fekk ein skaða við kappingarbyrjan í fyrra árið og spældi tí millum lítið og onki tað árið. Hon spældi so við í fjør, men hon bleiv ongantíð tann sami leikarin aftur, sum hon var, tá hon kom til Stjørnuna.

Hann sigur eisini, at ein møguleiki er at keypa fleiri útlendskar leikarar, men tað kostar nógvar pengar. Og so er minni peningur til taks til tær yngru deildirnar, og tað er jú tey ungu, sum felagið skal yvirliva upp á.

Geir Wardum sigur, at tey hava fingið ein jugoslaviskan leikara til Klaksvíkar at venja kvinnuliðið hjá Stjørnuni. Hendan kvinnan hevur verið á jugoslaviska landsliðinum, og hon skal verða leikandi venjari. Aftur at henni er ein onnur eisini úr jugoslavia. Tær hava spælt á sama liði í sjey ár í jugoslavisku fyrstu deild.

- So talan er um rættiligar góðar leikarar, sum eru 31 og 32 ára gamlar. Men tað er onki endamál við at fáa tær hendavegin, tá ongin manning er at venja. Tær hava verið professionellar í langa tíð, og at fáa tær til Klaksvíkar at venja okkara lið, og tað so bert møta einar fimm ella seks kvinnur upp til venjing. Tað er at halda tær fyri tann turra spott. So eg veit ikki, hvat er at gera, sigur ein sera vónbrotin Geir Wardum úr Stjørnuni.

### Unglingar ongan áhuga

Nevndin hevur eisini verið í samband við tey yngru liðini hjá Stjørnuni.

- Vit tosaðu við tær, sum júst eru fluttar upp í unglingar, um at møguliga koma at venja við fyrstu deild, men tær gjørdu beinanvegin greitt, at tær høvdu ongan áhuga í at vera seriøsar. Tær ætlaðu sær bert at hugna sær í triðju deild. So um hatta er hugburðurin hjá teimum ungu, ja, so hava vit ongan møguleika at byggja nakað upp, fyrr enn tær, sum í dag leika við gentum 16 ár, hava aldur til at leika við fyrstu deild, heldur Geir.


*Tað sær svart út í kvinnuliga hópinum hjá fyrstudeildar liðinum hjá Stjørnuni. Liðið hevur mist stórt sæð allar leikararnar, sum blivu meistarar fyri trimum árum síðani*

Mánakvøldið verður limafundur í KÍ høllini, har støðan verður løgd fram sum hon er.

- Og so skal avgerðin takast – um fyrsta deild kvinnur verða við í kappingarárinum ella ikki. Um vit skulu halda fram, so kemur tað at kosta í ár, sigur Geir og sipar her til kostnaðin av at skula keypa einar tríggjar leikarar afturat.

- Men also vit kunnu ikki koyra klappar fyri eyguni. Vit mugu síggja veruleikan í eyguni: At tað sær absolut út sum, at tað ikki verður nakað fyrstu deildar lið hjá kvinnum úr Stjørnuni komandi kappingarár. Og tað er sera harmiligt, men við at verða veruleiki, sum er, staðfestir formaðurin í Stjørnuni.

- Men sjálvandi, er onkur hondbóltsleikari, sum situr aðrastaðni í landinum og bíðar eftir at fáa møguleikan til at spæla fyrstu deildarhondbólt, so kann viðkomandi altíð seta seg í samband við okkum. Og so møguliga spæla her norðuri, sigur Geir Wardum og vísir samstundis á, at tað ikki longur er so tvørligt at ferðast um Leirvíksfjørð, sum tað var. Tí nú siglir Dúgvan úr Klaksvík nógv seinni á kvøldi.



## UTTAN ÚR HEIMI

# 600.000 flutt burtur


*Nógv hús í býnum Changsha standa longu undir í vatni. Meiri enn seks milliónir fólk búgva í býnum.*

**Myndugleikarnir í Kina hava nú flutt 600.000 fólk burtur frá Dongting-vatninum.**

VATNFLÓÐ
*Árni Joensen*

Kinesisku myndugleikarnir siga, at 16 fólk eru druknað, og tað nógva vatnið hevur longu oyðilagt 27.000 hús. 415.000 hektarar av dyrkaðari jørð standa undir í vatni.

Meiri enn ein millión arbeiðsmenn, hermenn og sjálvboðin royna av øllum alvi at gera byrgingar, sum kunnu forða fyri, at Dongting-vatnið fer upp um bakkan. Í gjár var vatnið so stórt, at vatnsstøðan var 2,7 metrar oman fyri vandamarkið.

Kinesisku myndugleikarnir siga, at fer vatnið upp um bakan, kann tað gerast ein sonn vanlukka fyri býirnar Changsha og Wuhan. Meiri enn 13 milliónir fólk búgva í teimum báðum býunum. Men fólk bera longu ótta fyri tí ringasta, og tí hava myndugleikarnir í teimum báðum býunum givið boð um at rudda gøturnar, so bjargingarlið kunnu sleppa ótarnað fram, gerst tað neyðugt.

# Umheimurin mótmælir deyðadómi ímóti nigeriskari kvinnu

**Fleiri lond og felagsskapir hava andstygd fyri avgerðini hjá einum nigeriskum dómstóli at døma eina kvinnu at verða steinað til deyða, tí hon hevur fingið eitt barn, sjálvt um hon ikki er gift.**

DEYÐAREVSING
*Árni Joensen:*

Einstaklingar, felagsskapir av ymiskum slagi og almennir myndugleikar hava seinastu dagarnar mótmælt avgerðini hjá nigeriska dómstólinum at døma ta 30 ára gomlu Aminu Lawal at verða steinað til deyða, tí hon hevur fingið eitt barn. Lógarbrotið er, at kvinnan er ikki gift.

Amina Lawal verður tó ikki tikin av døgum beinanvegin, tí hon gevur dóttur síni bróst, men tá barninum ikki nýtist móðurmjólkina longur, skal mamman steinast til deyða. Tað hevur rætturin avgjørt.

Fleiri lond, teirra millum Danmark, Svøríki, Bretland, Frakland, Italia og Spania, hava mótmælt hjá nigerisku myndugleikunum, og norski forsætisráðharrin, Kjell Magne Bondevik, hevur sagt, at hann fer at mótmæla, tá hann í næstu viku skal hitta nigeriska forsetan á ST-toppfundinum í Johannesburg.

ES hevur eisini mótmælt, og ein talsmaður hjá amerikanska uttanríkisráðnum hevur sagt, at avgerðin hjá nigeriska dómstólinum at døma eina einliga mammu til deyða, tí hon sum ógift hevur fingið eitt barn, er skelkandi.

### Amnesty skelkað

Amnesty International hevur sum rímiligt er eisini mótmælt dóminum.

- Amnesty International er ímóti allari deyðarevsing, men tað er serliga skelkandi, at dómstólurin í hesum føri hevur gjørt av, at tann dømda skal steinast til deyða, tí verri deyðarevsing finst ikki, sigur ein talsmaður hjá Amnesty International.

Viðurskiftini í Nigeria eru sera trupul. Landið hevur álvarssamar búskapartrupulleikar at dragast við, men politisku trupulleikarnir eru eisini stórir. Hetta seinna kemst serliga av, at tólv landspartar har norðuri í landinum hava tikið seg saman, og eygleiðarar tulka hetta sum eina roynd at koyra landið í tvíningar.

Í hesum landspørtunum búgva yvirhøvur muslimar, og her hava myndugleikarnir gjørt av at seta tær sera strongu muslimsku sharialógirnar í gildi. Tær heimila m. a. deyðarevsing fyri eitt nú ótrúskap, og tað er hesum lógum, Amina Lawal er dømd eftir.

Lógirnar heimila eisini verjunum hjá teirri dømdu kvinnuni at skjóta úrskurðin inn fyri hægri rætt. Tað verður uttan iva gjørt, og Amnesty International hevur heitt á lond kring heimin um at mótmæla úrskurðinum um deyðarevsing, áðrenn málið kemur fyri hægri rætt. Sambært mannarættindafelagsskapinum eru altjóða mótmæli tað einasta, sum kann bjarga Aminu Lawal undan at verða steinað til deyða.

## Danir í flotastríði

Ósemja hevur tikið seg upp millum Danmark og Russland. Leiðslan í russiska herflotanum vil vera við, at eitt danskt herskip kom dekan ov nær einum russiskum herskipi í Eystrasalti mikudagin. Russiska skipið var við í einari venjing, og sambært russiska admiralinum kom danska skipið alt ov nær russiska skipinum. Admiralurin sigur, at russiska skipið skjeyt fleiri rakettir hesa løtuna sum lið í venjingini, men at danska skipið kortini kom so nær, at tann eina rakettin streyk fram við brúnni á danska skipinum. Admiralurin sigur, at danski skiparin setti lívið hjá manning síni í vanda.

Í donsku flotaleiðsluni siga teir seg ikki skilja russisku ábreiðsluna. Sagt verður, at danska skipið Søløven var á leiðini, har russiska venjingin var, men at skipið ongantíð var so nær russisku skipunum, sum russiski admiralurin vil vera við.

Ongar reglur eru, sum siga, hvussu nær fremmand skip kunnu koma einum herskipi undir venjing. Sum í øðrum førum er góður sjómansskapur reglan.

## Putin fingið gest

Tað er sjáldan, at norðurkoreanski leiðarin, Kim Jong-Il, fer av landinum at ferðast, men nú er hann so uttanlands, hóast ferðin ikki er long.

Hesaferð er Kim Jong-Il farin til russiska kyrrahavsbýin Vladivostok, har hann hevur hitt russiska forsetan, Vladimir Putin. Sambært russiskum embætismonnum ætlar norðurkoreanski leiðarin at tosa við Putin um tær búskaparligu nýskipaninar, sum hann ætlar at seta í verk.

Í seinastuni hevur ymiskt bent á, at Norðurkorea hevur hug at gloppa dyrnar fyri umheiminum, og í Vladivostok skuldi Kim Jong-Il eisini tosað við Putin um at binda tað norðurkoreanska jarnbreytarkervið saman við teirri víðakendu transsibirisku jarnbreytini. Verður tað gjørt, verður jarnbreytarsamband úr Norðurkorea til Vesturevropa.

## Rannsakaðu hjá ommuni

Løgreglan í Bretlandi leitar framvegis eftir próvtilfari í málinum ímóti Ian Huntley, sum er skuldsettur fyri at hava beint fyri tveimum tíggju ára gomlum gentum í býnum Soham.

Í gjár váttaði løgreglan, at hon hevði verið heima hjá ommu Ian Huntley og rannsakað hús hennara. Frammanundan hevði løgreglan rannsakað húsini, sum pápi tann skuldsetta býr í.

Sjálvur er Ian Huntley á einum sinnissjúkrahúsi, har løgreglumenn standa á varðhaldi alt samdøgrið.

## Vilja ikki tosa um frið

Tann vinstrasinnaði uppreistrarfelagsskapurin í Kolombia, FARC, hevur sýtt fyri at taka av einum tilboði frá ST um samráðingar, sum skuldu hava til endamáls at fáa enda á borgarakrígnum í Kolombia.

Tað var nývaldi forsetin, Alvaro Uribe, sum bað ST royna seg sum semingsmann í stríðnum, men tað vil FARC ikki hoyra talan um.

Leiðslan í FARC sigur, at hevði hon tikið av tilboðnum, hevði tað gjørt borgarakríggið til eitt kríggj millum uppreistrarfelagsskapin og ST. Tað er stjórnin, vit berjast ímóti, sigur felagsskapurin.